FØROYA HANDILSSKÚLI



# Skrivstovulærlingur til Føroya Handilsskúla í Havn

**Kundi tú hugsað tær eitt læruppláss á einum skúla, har nógv spennandi er at gera? Vit leita eftir einum ágrýtnum og dugnaligum skrivstovulærlingi at byrja 1. august 2008 á skrivstovuni á Handilsskúlanum í Havn.**

**Arbeiðsuppgávur:**

- næmingaskráseting
- avgreiðsla av viðskiftafólki
- telefonavgreiðsla
- bókhald
- luttøka í verkætlanum, sum skúlin skipar fyri

**Vit vænta, at tú:**

- hevur FHS- ella HH-útbúgving (Fært tú prógv í summar, ert tú eisini vælkomin at søkja)
- sýnir tænastusemi
- kanst hava nógvar bóltar í luftini í senn
- vilt vera við at menna skúlan
- ikki ræðist nýggjar avbjóðingar

**Vit kunnu m.a. bjóða:**

- eitt fakliga mennandi læruumhvørvi
- eftirútbúgvingarmøguleikar
- góðar arbeiðsumstøður
- ein spennandi og lívligan gerandisdag

**Løn:**
Lønin verður eftir sáttmála millum Starvsmannafelagið og Fíggjarmálaráðið.

**Umsókn:**
Umsóknin skal stílast til Føroya Handilsskúla og sendast til Føroya Handilsskúla, Marknagilsvegur 77, Postsmoga 177, 110 Tórshavn. Umsóknirnar skulu vera skúlanum í hendi í seinasta lagi 6. juni 2008.

Fleiri upplýsingar um størvini kunnu fáast við at venda sær til Elina S. Norðbúð á 317 177 ella og á en@hsh.fo.

*Á Føroya Handilsskúla ganga umleið 400 næmingar. 200 á hægri handilsskúla (HH) og 200 á fyrisiting, handli og skrivstovu (FHS). Undirvísingin er í Havn og á Kambsdali. Í Havn starvast um 35 lærarar, á Kambsdali um 20. Umframt HH og FHS skipar Føroya Handilsskúli fyri kvøldskúla og framhaldsútbúgvingum so sum HD og akademimerkonom.*

FØROYA HANDILSSKÚLI

Postsmoga 177
110 Tórshavn
Tel 31 71 77
Telefax 31 33 74

www.fh.fo

SENDISTOVAN

FUGLAFJARÐAR KOMMUNA

# LÝSING EFTIR DAGRØKTARUM

Søkt verður eftir dagrøktarum til kommunalu dagrøktina í Fuglafjarðar kommunu at byrja tann 15. august 2008.

Í dagrøktini í Fuglafirði arbeiða 8 dagrøktarar.

Spælistova er knýtt at dagrøktini. Í dagrøktini ganga 40 børn, í aldrinum 0 – 7 ár.

Ein treyt fyri at søkja starvið er, at dagrøktarheimið skal verða barnavinarligt innrættað, har rúm er til børnini at spæla, og at eitt hóskandi trygt spæliøki er uttanfyri.

**Vit vænta at tú:**

- kanst arbeiða sjálvstøðugt
- hevur hug at skapa ein tryggan og mennandi gerandisdag, við virðing og umsorgan fyri tí einstaka barninum.

Lønin verður ásett sambært sáttmála millum Starvsmannafelagið og Kommunala Arbeiðsgevarafelag Føroya fyri dagrøktarar.

Nærri upplýsningar um størvini fáast við at ringja til Eyðgerð A. Petersen, dagrøktarleiðara á telefon 73 77 94, ella sosialdeildarleiðaran á telefon 73 77 56.

Møguligar umsókinir, ið skulu verða skrivligar, skulu verða Fuglafjarðar kommunu, Postboks 30, 530 Fuglafjørður í hendi í seinasta lagi leygardagin tann 14. juni 2008.

Kommunan skilar sær rætt til at velja millum innkomnar umsóknir ella onga at taka.


- Konsertir
- Fundir
- Framsýningar
og annað

miðlahúsið í Vágsbotni

# BRÚKIÐ MIÐLAHÚSIÐ



Ring og hoyr nærri

TÓRSGØTA 1 · TEL 341800 · FAX 341801
POST@SOSIALURIN.FO · WWW. SOSIALURIN.FO

Sosialurin

FØROYABANKI
stuðlar tiltøkum í Miðlahúsinum





Bátar til ein hvønn tørv

Les meira á www.meklarin.fo

HP. MARINE · SP/F RÚNAR
Túnagøta 1 · 600 Saltangará
tlf. 219450 · fax 449191 · hpe@kallnet.fo